# Milan vil hava Drogba

Tað er blivið alt meira sannlíkt, at Didier Drogba skiftir frá Chelsea til AC Milan. Varaforsetin í italska felagnum sigur, at Chelsea hevur givið AC Milan loyvi at tosa við Drogba. Hinvegin endar Andrei Shevchenko ikki aftur í AC Milan, sum annars hevur roynt at keypa hann heimaftur til Milano. Chelsea hevur noktað fyri, at Schevcenko kann seljast til AC Milan.




# City samráðist við Ronaldinho

Tað er langur teinur frá Barcelona til Manchester, men tað verður møguliga leiðin, sum brasilska stjørnan Ronaldinho skal leggja. Leiðslan í Manchester City sigur, at hon hevur fingið loyvi at taka upp samráðingar við Ronaldinho. - Tað er framvegis tíðliga, og eg vil ikki avdúka ov nógv, men Barcelona hevur givið okkum loyvi at tosa við Ronaldinho, sigur Garry Cook, nevndarformaður í Manchester City.

## B36-Víkingur 3-0 (1-0):

# Málini telja



*Víkingur hevði bóltin stóran part av tíðini í Gundadali, men tað vóru teir á heimaliðnum, sum vóru mmeira beinleiðis í spælinum*

*Savnsmynd*

*B36*

*Víkingur*

**Hóast B36 ikki var leikliga omaná, so vunnu teir greiðan sigur í Gundadali í gjár, tá Víkingur vitjaði. Hanus Thorleifsson fekk beinleiðis reytt og er tískil leikbannaður í steypafinaluni, sum verður leikt komandi vikuskiftið**

**FÓTBÓLTUR**
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Tað er rok í Gundadali. Fleiri av leikarunum eru farnir til hendurs, og Heðin Askham, venjari hjá B36, er lopin út á vøllin í eini roynd at sissa sínar leikarar. Á vøllinum liggur Magnus Skoralíð og gremur seg, meðan fjepparafelagið hjá árstalsfelagnum geylar eftir honum. Niðurstøðan var reytt kort til Hanus Thorleifsson.

B36 er á odda við tveimum og hevur fullkomiliga tamarhald á tannleysu gestunum. Eftir nærdyst misti Thorleifsson høvdið eina løtu, og Magnus Skoralíð fekk sviðjan at merkja. Farvæl til Hanus Thorleifsson, sum somuleiðis verður leikbannaður í finaluni um løgmanssteypið.

### Potemkin

Tað vóru fáar dramatiskar og áhugaverdar hendingar, tá yngra høvuðsstaðarfelagið og Víkingur hittust í Gundadali í gjár. Hæddarpunktið var, tá Thorleifsson var vístur av vølli.

Karoly Potemkin átti týðandi leiklut í 3-0 sigrinum hjá B36. Tvær ferðir kundi hann lata seg fagna sum málskjútta av viðhaldsfólkunum hjá heimaliðnum. Ungarski framherjin tykist at hava fingið fótin fyri seg eftir trupla byrjan upp á kappingarárið, har hann skal royna seg í uppgávuni, sum Amed Davy Sylla loysti fyrimyndarliga í ár. Miskeiðis í fyrra hálvleiki legði hann B36 á odda, tá Bergur Midjord var sendur avstað í høgru, legði bóltin fyri føturnir á Potemkin, sum sendi í netið. Átta minuttir fyri tíð var hann sendur avstað, og einsamallur við framherjanum var hann tryggur.

Leikliga var munurin á liðunum ikki stórur. Víkingur smæddist als ikki burtur, men á seinasta triðinginum á vøllinum vóru teir ikki vandamiklir. Serliga fekk Zoltan Bukszegi lítið burturúr.

### Vantandi hugflog

Heðin Askham var fleiri av sínum stuðulsleikarum fyri uttan. Asbjørn V. Gunnarsson røkti plássið sum vongverji í høgru, meðan bæði Magnus Olsen og Hanus Thorleifsson vóru á miðvøllinum. Hóast hesir stóðu seg væl, so var eyðsæð, at teir ikki eru heilt vandir á hesum plássum.

Víkingur hevur fleiri dugnaligar bóltleikarar á miðvøllinum, men vantandi hugflog var orsøkin til, at meira ikki spurdist burturúr. Sum einstaklingur søkti Andreas Lava Olsen ofta at, men vandamikið varð tað sjáldan.

Gestirnir spældu við einum manni fleiri seinastu 20 minuttirnar, og vóru teir nógv á bóltinum hesa løtuna. Serliga sendu teir ofta inn úr vinstru, men øll innleggini sótu tætt at Meinhardti Joensen, sum ongantíð kom í trupulleikar.

Bergur Midjord økti til 2-0, tá klokkan var um at runda tíman. Trýstur av verjuleikara fekk hann hegnisliga sent í handara málhorn eftir innlegg úr høgru.

### Nærmastu kappingarneytar

Við sigrinum er B36 nú nærmasti kappingarneyti hjá oddaliðnum EB/Streymi. Tað var alt annað enn vænta undan kappingarbyrjan. Tað skal tó leggjast aftrat, at átta av teimum 10 landskappingardystunum hjá árstalsfelaginum eru leiktir á heimavøllinum í Gundadali.

Víkingur stríðist um pláss í Evropa komandi kappingarár. Nógv skal gerast øðrvísi um teir skulu bjóða oddaliðunum av, og í løtuni er tað óhoyrt, at samanlagda felagið úr Gøtu og Leirvík skal stríðast um annað enn bronsuheiðursmerkið.

# Tápuligt

Heðin Askham metti reyða kortið hjá Hanus Thorleifssyni vera tápuligt og sera óneyðugt.

- Ja, tað er torført at góðtaka slíkt. Nú mugu vit verða hann fyri uttan í finaluni um løgmanssteypið eisini, staðfestir Askham.

Venjarin hjá B36 frøddist sjálvsagt um sigurin.

- Tað er gleðiligt at síggja úrslitið frá venjingunum aftur á vøllinum. Nú fara vit at fyrireika okkum til steypafinalu, sigur Heðin Askham, høvuðsvenjari hjá B36.

# Munurin var ikki stórur

- Leikliga var munurin á liðnum ikki stórur. Teir komu fram til møguleikarnir og tóku av, meðan vit høvdu lítið at bjóða í framrættaða spælinum.

Orðini eigur Niclas Niclasen, verjuleikari hjá Víkingi. Klaksvíkingurin tóktist ikki serliga vónbrotin eftir dystin, hóast greiðan ósigur.

- Vit fáa eisini trý mál ímóti okkum, og í so máta hevði B36 uppiborið sigurin. Leikliga stóðu vit tó einki aftanfyri, sigur Niclas Niclasen.

Klaksvíkingurin í Víkingi noyddist at lata seg skifta út miðskeiðis í seinna hálvleiki. Orsøkin var ein lítil skaði, men hann staðfestir, at hann væntandi verður til venjingarnar í vikuni.


# Móttøka

## í Bitland Skrivstovufelagsskapinum í Miðbýnum í Havn




Bitland hevur nú víðka skrivstovufelagskapin til at fevna um 3 bygningar við meira enn 1100 fermetrum í Miðbýnum í Havn. Hetta gevur rúm til umleið 50 skrivstovupláss.

Í hesum sambandi bjóða vit til móttøku á 3. og 4. hædd í Niels Finsensgøtu 8 (Handilskjarnin).

**Fríggjadagin 13. juni kl. 15-17**

| | | |
|---|---|---|
| Advokatarnir Hentze | Decision3 | Simprentis |
| Birtan v/Vilhjálmi Nielsen | Føroya Sporførisskipan | Dali Consulting |
| Bogi Eliasen | I-Invest | Sletters |
| Dam Virkisráðgeivng | Jónsvein Joensen | Tutl |
| Gebs | Ocean RainForest | Tórshavnar Kommuna |
| Hildur Patursson | Sálarfrøðistovan | (Menningardeildin) |

Fær nýskapan til høldar

bitland.fo